


*Nr. 12* *9. juni 2013* *73. árg.*

# Syndajáttan – syndafyrigeving

Jesus fór upp á krossin og rindaði fyri allar okkara syndir. Kolossebrævið 2,14 sigur: ”Hann strikaði út skuldabrævið, sum kom okkum við og var skrivað við boðorðunum, tað sum var okkum ímót, og hann beindi fyri tí, við tað at hann negldi tað á krossin.” Íðan, tá ið Jesus hevur betalt fyri allar syndir heimsins, eru so øll menniskju frelst? Nei, syndin má játtast fyrst. ”Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi.” 1. Jóh. 1,9.

Tað liggur ein djúp tráan í menniskjum at sleppa at játta sínar syndir. Nú ein sunnumorgun, tá ið eg var í dómkirkjuni, tosaði Ann Dahl Hansen, prestur um hesi ting, og vil eg stutt greiða frá teimum:

Yviri í Amerika vóru tað nøkur fólk, sum fingu sær ein telefonsvarara, so kundu menniskju ringja inn har og játta tað skeiva, ið tey høvdu gjørt. Fólkini aftan fyri telefonsvararan vóru ikki trúgvandi, hetta var eitt verðsligt tiltak. 200 fólk ringdu inn um dagin! Tað vísir okkum, at menniskju hava eina trongd at sleppa at játta. Tað lættir um byrðuna.

Hvat játtaðu tey so? Alt møguligt, frá ”smáum syndum” til revsiverd brotsverk, harðskap, stuldur, hor og morð.

Hvat sigur Guds orð so um slík ting? Er fyrigeving fyri slíkar syndir? Ja, um vit játta tær fyri Gudi og møguliga fyri menniskjum eisini. Móses, sum var leiðari Ísraels, var drápsmaður. Kortini kundi Gud brúka hann at leiða fólk sítt til lovaða landið. Hann var eisini maðurin, sum talaði við Gud andlit til andlits. Dávid var bæði drápsmaður og horkallur. Hann játtaði sína synd, og hetta

brotsverkið kom at kosta honum nakað. Men tá ið Gud fyrigevur, so gloymir hann fullkomiliga tað, sum játtað er. Tí sigur Bíblian um Dávid, at hann var maðurin eftir Guds hjarta. Man tað vera fyrigeving fyri at avnokta Jesus? Ja, tað gjørdi Pætur. Hann enntá bannaði uppá, at hann ikki kendi Jesus. Men Jesus, sum kennir hjørtuni, sá, hvussu hann angraði syndina, og Jesus møtti Pæturi eftir uppreisn sína og kundi brúka hann stórliga.

Ernest Hemmingway hevur skrivað eina søgu, sum eitur Pablo. Har greiðir hann frá um ein pápa, sum hevði ein óflýggjaligan son, men pápin vildi fyrigeva soninum og setti eina lýsing í dagblaðið. Har stóð: Pablo, møt mær tá og tá, á tí og tí hotellinum. Alt er fyrigivið. Pápi. Nú er Pablo eitt vanligt navn í Spania, og tá dagurin kom, møttu yvir 500 menn. Tað vísir okkum, at fólk vilja játta og harvið lætta um byrðuna.

Sjálvur livdi Hemmingway eitt vilt lív, og foreldrini vildu ikki fyrigeva honum. Men soleiðis er Jesus ikki. Tann, sum játtar, fær treytaleysa fyrigeving, og syndabyrðan rullar av herðunum.

*Effie Campbell.*

# Bið Gud vælsigna matin í Jesu navni

**Thurman Scrivner**

Í Guds orði lesa vit: "Vinalig orð eru dýrur hunangur, søt fyri sálina, heilsubót fyri beinini." Orðt. 16,24. Guds orð sigur, at vinalig orð eru heilsubót fyri bein tíni. Skulu vit nakrantíð tala annað enn vinalig orð? Avgjørt ikki! Vit skulu ikki tala í illsinni hørð og ljót orð. Vit skulu tala mild orð.

Fyri nøkrum árum síðani vóru vit í vestara parti av Texas. Har er ein kristilig sjónvarpsstøð, nakað sum Visjon Norge. Vit hava sendingar har einar 4-5 ferðir um vikuna. Har kom ein maður, sum er lækni, hann er eisini vísindamaður. Hann var við í einari sending, so hann kundi vísa, hvat ið hann hevði lært við sínari gransking.

Hann tók nakrar vatnkrystallir og vísti tær undir einari sjóneyku, einum mikroskopi, so tú sást, hvussu vatnmýlini síggja út. Um tú spælir góðan kristnan sang uppi yvir teimum, broytast tey fullkomiliga. Um tú biður eina bøn uppi yvir teimum og sigur: "Faðir, vælsigna hetta vatnið í Jesu navni," so broytast mýlini. Tey gerast so vøkur. Tað er undurfult. Men tú kanst tosa okkurt negativt niður yvir tey, tá gerast tey andskræmilig og ljót. Um tú spælir harðan rokktónleik uppi yvir teimum, gerast tey garvill.

Tá ið eg sá, hvat ið hendi við hesum vatni, kann eg vissa teg um, at eg ongantíð aftur leski ein vatndropa, uttan at eg fyrst biði Harran vælsigna hetta vatnið í Jesu navni.

Tá ið eg sá hesa framvísingina, hugsaði eg eisini um nakað annað. Summstaðni úti í heimi hava tey harðar rokkkonsertir. Har koma gentur og dreingir í túsundatali at lurta eftir hesum heimsins svansi. Sumt av hesum tónleiki spottar Jesu navn, og tú undrast á, hví summir av hesum ungdómum, sum lurta eftir hesum tónleiki, gerast púra ørir. Tey hava sex, tey drepa hvørt annað og gerast púra garvill.

Men mannakroppurin er úr 75% av vatni, og heilin er úr 85% av vatni. Nú, um slíkt hendir við vatni í einum glasi, hvussu skal tað so ikki verða við mannakroppinum, tá ið hesi fólkini syngja og skrála ræðulig ting út gjøgnum sín tónleik. Hvat heldur tú, tað ger við kropparnar á hesum ungu? Tað fer at gera ræðulig ting við tey; men um tú hevði kunnað sæð ta undurfullu framvísingina, hvat ið hendir við mýlunum eftir mildan tónleik og bøn í Jesu navni, tá hevði tú gjørt júst sum eg, tú hevði altíð talað til matin og vatnið og signa tey í Jesu navni, áðrenn tú fert at fáa tær.

Gud hevur givið okkum eitt lyfti í Orði sínum: “Tit skulu tæna Harranum, Gudi tykkara, tá vil eg vælsigna breyð títt og vatn og reka allar sóttir frá tær.” 2. Mós. 23,25. Men sjálvt um hann hevur lovað at gjørt tað fyri meg, so sigi eg altíð sjálvur eina lítla bøn uppi yvir matinum fyri at vera dupultvardur. Hugsa um hetta sum trúgvandi.

*Effie Campbell* umsetti.

# Seinasta og sjeynda krossarorðið

*“Faðir, í tínar hendur gevi eg anda mín!” Luk. 23,46.*

Hatta er Sálmur 31,6. Men Jesus leggur eitt orð afturat: “Faðir.” Hatta versið er tann bønin, sum allar jødiskar møður lærdu børn síni at biðja sum tað síðsta, tey gjørdu á kvøldi. Soleiðis kundi barnið leggja seg trygt, áðrenn tað hóttandi myrkrið seig niður: “Í tínar hendur gevi eg anda mín.” Jesus gjørdi bønina enn vakrari, tí hann byrjaði hana við orðinum “Faðir”. Sjálvt á krossinum doyði Jesus sum eitt barn, sum svevur í ørmunum á pápa sínum. Tað er lívsins Harri, sum gevur lív sítt upp í hendurnar á Faðirinum.

Hugsa tær til, hvussu trygt vit eisini kunnu leggja lív okkara í Faðirsins hendur. Tað kunnu vit gera, av tí at Jesus fullførdi verk sítt fyri okkum á krossinum!

Sten Sørensen.
*Effie Campbell* umsetti.

# At vilja tekkjast øðrum

*“Er Gud við okkum, hvør er tá ímót okkum?” Róm. 8,31.*

At vilja tekkjast øðrum er eitt ússaligt lívsgrundarlag. Tú vendir ranguna út á tær sjálvari fyri onnur; men beint sum tú heldur, at tú hevur vunnið tey, broyta tey meining.

Dávid segði: “Eg líti á Gud, eg vil ikki óttast, hvat kann kjøt (t.e. deyðiligur) mær gera.” Sálm. 56,5. Og Paulus spurdi: “Er Gud við okkum, hvør er tá ímót okkum?” Róm. 8,31.

Um tú ivast í onkrum, sum Gud hevur biðið teg gjørt, so er tað soleiðis, at ein máti, Gud leiðir okkum uppá, er at vit fáa eina kenslu av friði. Tað er eins, og vit hoyra Gud siga: “Ja, her er vegurin, gakk hann!”

Jesaja talar um tað: “Ja, við gleði skulu tit fara avstað og í friði verða fylgd á veg.” Jes. 55,12. Og Paulus sigur: “Latið okkum tráa eftir tí, sum fremur frið.” Róm. 14,19.

Vit skulu taka undir við Paulusi og ongantíð gera nakað, uttan at vit kenna ein frið í tí. Men tað gera vit tíverri ofta, tá ið fólk koma og vilja hava okkara hjálp at gjøgnumføra sínar ætlanir!

Jesus lærdi lærusveinar sínar: “Um onkur ikki vil taka ímóti tykkum og ikki heldur lýða á orð tykkara, tá farið út úr tí húsi og teirri bygd og ristið dustið burtur undan fótum tykkara.” Matt. 10,14. Tí skulu vit, um atburðurin hjá øðrum setir okkum í vanda fyri ikki at gera Guds vilja, rista teirra atburð av okkum, og kvika okkum víðari.

Nøkur brúka sínar gávur og talentir og geva Gudi æruna, onnur misbrúka sínar og gera Gud sorgarbundnan. Nøkur æra hann við sínum fruktum, onnur særa hann við sínum umberingum.

“... et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 9. juni. | Tekstur: | Jóh. 13,1-17 | bíbliuorð: | Jóh. 13,15 |
| 16. juni. | Tekstur: | Mark. 12,41-44 | bíbliuorð: | Matt. 7,7 |
| 23. juni. | Tekstur: | Jóh. 8,2-11 6,37b | bíbliuorð: | Dán. 9,9a |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74